Hanna D. Andreassen

Fra: Familjuhjálpin Arbeiðsbólkur <familjuhjalpin@gmail.com>
Sendt: Wednesday, January 31, 2024 02:31
Til: Maria Michelsen
Emne: viðmerkingar til lógaruppskot
Vedhæftede filer: Viðmerkingar-til-lógaruppskot.pdf

Kategorier: Gul kategori

góðan dag
vit vilja hervið koma við viðmerkingum.
vh
Familjuhjálpin
Mariann

https://cdn.fbsbx.com/v/t59.2708-21/419248439_870921204775299_8744806781589960808_n.pdf/Viðmerkingar-til-lógaruppskot.pdf?_nc_cat=106&ccb=1-7&_nc_sid=2b0e22&_nc_ohc=EMabkRhvMIUAX8olfQz&_nc_ht=cdn.fbsbx.com&oh=03_AdQqle9bZ8qatFZqhuUOjwkQt9FZRtkeT3O1Q4KRR_qsmQ&oe=65BB0C31&dl=1

Sent from my iPhone

Tað er gleðiligt at Barna- og útbúgvingarmálaráðið eru villug at gera broytingar í Barnaverndarlógini.
Men tað er sera undrunarsamt hvørjar hesar broytingar skulu vera.

Nr. 1. Hvar í Barnaverndarlógini, hava fakfólk ella onnur vanlig deyðilig, ikki møguleika at gera eina fráboðan ella gera vart við sína stúran um eitt barn, sum býr í Danmark? Ella eina komandi mammu, ið býr í Danmark.
Barnaverndarlógin sigur, at fakfólk hava skerpaða fráboðanarskyldu. Barnaverndarlógin sigur einki um, at henda fráboðanarskylda einans er galdandi í Føroyum.
Hava donsk fakfólk ikki førleikar at síggja um eitt barn hevur tørv á hjálp? Ella er orsøkin at fleiri familjur eru fluttar til Danmarkar undan barnaverndini, og barnavderndin hevur mist maktina yvir børninum?
At hetta er neyðugt at seta við lóg, vísir mest av øllum hvussu lítið álit barnaverndartænastan hevur á fakfólk, sum dagliga arbeiða við børnum og ungum.

Nr. 2. Hetta er ikki ein mangul í núverandi barnaverndarlóg. Barnaverndarnevndin hevur heimild til at seta alla tað fyriskipan tey meta neyðuga eftir galdandi barnaverndarlóg. (vegleiðing til lógina er viðheft niðast.)

Nr. 3. Hetta er vanlig mannagongd, sum er í tráð við galdandi barnaverndarlóg. Tað er ikki ein trupulleiki at seta eina fyriskipan í verk, men tað er ein stórur trupulleiki hjá barnaverndartænastuni at hava álit á teirra egnu fyrskipan, tá hesi fakfólk hava eina aðra hugsan um tingini enn sosialráðgevin sjálvur hevur. Tað er ikki neyðugt at gera eina tillaging, sum framanundan er galdandi. Men tað er tørvur á at geva sosialráðgevunum minni ábyrgd.

Nr. 4 Hvør skal verja barnið tá sosialráðgevin ikki er førur fyri at takað eina objektiva avgerð?

Nr. 5. Hvussu verjur hetta rættartrygdina hjá barninum / familjuni? Tað er almenn vitan at barnaverndartænastan í nærum øllum førum, ikki fylgir tilráðingum frá øðrum enn sær sjálvum. Hví skal barnaverndartænastan verjast fyri ikki at fylgja tilráðingum? Eru tað ikki fakfólk, ið koma við hesum tilráðingum? Eftir lógini skal barnaverndarnevndin verða sett av fakfólkum.

Nr. 6 Hetta er ein mangul av hægsta stigi. Her má tryggjast betur, at foreldur og barn verða hoyrd og ikki sosialráðgevin, barnaverndin, barnaverndarnevndin.

Tað er alt ov stórur inhabilitetur í skipanini í dag. Nærum øll barnaverndarmál vera persónsmál fyri sosialrágevan, ið situr á málinum. Tað er sosialráðgevin, ið lýsir málið, og tekur støðu til hvussu málið skal lýsast. Barnaverndarnevndin fær einans tey skjøl, ið sosialráðgevin metir eru neyðug fyri at lýsa egnu fatan av málinum. Hóast barnaverndin hevur notatskyldu, so verður hendan nærum ongantíð fylgd ella gjørd útfrá hvussu sosialráðgevin ynskir at tulka tingini.

Hóast tað er gleðiligt at Barna- og útbúgvingarmálaráðið ynskir at broyta/tillaga barnaverndarlógina, er tað sera undrunarsamt at kjarnan í trupulleikanum altíð skal goymast vekk. Tað tykist, sum ude af øje ude af sind, er ein tann mest fakligi hugsunarhátturin, tí tá kunnu vit samstundis bara venda blinda eyga til og pástanda at tað vit hoyra um ikki passar.

Í dag er ONKI eftirlit við um Barnaverndirnar arbeiða útfrá ásetingunum í lógini. Tað er sera undrunarsamt at mynduleikin við ábyrgdini, av at tryggja at barnaverndin arbeiðir eftir ásetingunum í lógini og til barnsins besta, men heldur tryggjar at Barnaverndin skal fáa størri rásarúm til at seta barnsins heilsu og menning í so álvarsama vanda, at skaðin verður óbøtiligur.

Børn kunnu takast frá sínum foreldrum og setast í eitt ónøktandi tilboð, einans tí sosialráðgevin á málinum ynskir tað. Tað er onki eftirlit við um fyriskipanin tænir endamálinum ella um tillagingar skulu gerast. Sosialráðgevin hevur EINSAMALLUR heimild at siga hvat skal setast í verk. Sosialráðgevin hevur EINSAMALLUR avgerðarrættin, at taka støðu til, um onnur fakfólk skulu koma við tilráðingum og um hesar tilráðingar verða fylgdar.

Tað er undrunarsamt, at ONGIN ábyrgdarmynduleiki hevur førleikan at tryggja BARNIÐ framum sosialráðgevan. Hetta er kanska høvuðsorsøkin, tí tá alt kemur til alt so er ongin, ið torir at seta sosialráðgevar uppá pláss. Sálarligur harðskapur er gerandis kostur hjá børnum og foreldrum, ið samstarva við barnaverndina. Hvør torir, ella ber tað yvirhøvur til, at seta ein PSYKOPAT uppá pláss?

Endamálið við Barnaverndarlógini var at tryggja, at øll børn fingu ein góðan og sunnan uppvøkstur. MEN í dag er endamálið eitt annað. Heldur enn at tryggja at børn vaksa upp í einum sunnum umhvørvi og fáa neyðugu hjálpina, so hava Barnaverndirnar kring landi, arbeitt beint ímóti øllum lærdómi ein sosialráðgevi fær í sínum skúlaskeiði. Í allar flestu førum, ger barnaverndin størri skaða á barnið enn gagn. Lógin sigur at barnið skal hoyrast, men hetta verður mestsum ALDRIN gjørt. Um barnið verður hoyrt, so verður ONKI gjørt fyri at hjálpa barninum við sínum ynski, uttan so at barnið sigur nei at fara til síni foreldur.

Fyrsta treyt fyri at fáa eina lóg sum gagnar børnum, er at barnaverndin er før fyri at siga sannleikan. So leingi barnaverndin ikki er før fyri at siga sannleikan um hvussu tey brúka lógina í verki, so koma vit ongantíð at fáa eina lóg, ið tryggjar BARNIÐ. Sosialráðgevar sleppa við at lúgva seg frá allari ábyrgd uttan at blunka. Samstundis, sum foreldur verða undirløgt, at hava misskilt hvat er sagt. Hvar er hetta í trá við barnsins besta?

Dagsins sosialráðgevar hava ikki førleikan at hugsa loysningsorientera. Heldur enn at finna loysnir á trupulleikar, verður alt brúkt móti foreldrum. Um sosialráðgevin metir at forledur ikki hava nøktandi marksetan, so verður hetta brúkt sum grundgeving fyri at barnið ikki kann verða hjá foreldrunum, og eingin hjálp verður sett til at bøta um manglarnir.

Um Barna- og útbúgvingarmálaráðið ynskir at betra viðuskiftini hjá børnum og ungum, so er fyrsta treyt, at seta veitarin av eini tænastu til síðis og tosa við brúkaran av tænastuni. Og seta ein arbeiðsbólk, ið fer inn í barnaverndarmál.

Kann/vil Barna- og útbúgvingarmálaráðið gera nakað við tingini. Eftir øllum at døma so er ongin villigur at arbeiða til barnsins besta.

Barnaverndarøkið mátti fáa nýtt málaráð, tí ráðið, sum hevði øki undir sær, hevði onki gjørt við trupulleikan. Men hvat, somu ráðgevar sum sótu framanundan fylgdu við, so hvussu í allari víðu verð, kunnu vit halda at hetta fer at broyta tingini. Somu fólk sum hava feiða alt undir gólvtepp, sita enn við økinum.

Manglandi menningarførleikar eru heilt óhugnaligir, men tað viðførir eisini at vit kunnu ikki vanta at nakað skilagott fer at henda, sum er til gagns fyri barnið. Tað er heilt ófatiligt at tað letur seg gera, at sita á slíkum postum við einum so stórum manglandi menningarførleika. Einasta menniskja, ið hevur hetta slagi av manglandi menningarførleika, eru psykopatar, so spurningurin er, vilja vit hjálpa ella vilja vit koyra menniskju í senk við sálarligum harðskapi?

Endamálið við barnaverndarlógini

1

A LMANNA - OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 05.10.2004